Líti› kór – stór framførsla

Norsku gospelsangararnir úr Stavanger gjørdu pallin í Nor›urlandahúsinum um til eitt livandi alduhav, tá tey í sermerktu búnum sínum settu lív í hvønn annan, men ikki rættiliga fingu áhoyrarnar upp úr stólunum

RÚNAR REISTRUP

Hóskvøldi› á Jazzfestivalinum var gospelkvøld. Salurin var ikki heilt fullsettur, men fitt av fólki var kortini komi› at hoyra gospelsangararnar úr Noregi, sum fóru á pallin sum sí›sta framførsla hóskvøldi›.

Kóri› var ikki stórt, ta› taldi eini fimtan fólk, men kortini fingu tey heilt gó›a breidd í sangin. Tær mannligu røddirnar vóru tó ikki serliga sterkar í mun til kvinnurøddirnar, tí teir vóru heldur fáir í mun til tær.

Solosangurin var sum heild gó›ur, og serliga ein av kvinnunum megna›i at fáa áhoyrarnar at spíla oyruni út.

Eitt sindur óvanlig var hendan gospelkonsertin hjá Stavanger Gospel Choir vi› ta› at áhoyrararnir fyri ta› mesta sótu púra fri›aligir og lurta›u. Vanliga plaga gospelkór at royna at fáa áhoyrararnar vi› bæ›i í sangin og dansin, men hóskvøldi› komu áhoyrararnir ikki upp úr stólunum fyrr enn kóri› sang eykalag sítt.

Hinvegin var pallframførslan hjá kórinum ógvuliga lívlig, og ta› er helst ikki heilt av lei› at siga, at kóri› leg›i størri dent á sína egnu framførslu enn at fáa áhoyrararnar vi› í konsertina.

Alda á palli

At síggja til sá kóri› ikki út sum ta› kom úr einum oljub‡i í Noregi. Heldur vildi tú gitt at tey komu úr onkrari amerikanskari kirkju, visti tú ikki betur.

Teir kvinnuligu sangararnir vóru í ví›um litføgrum kappum yvir ber bein eins og gospelkór í amerikanskum kirkjum plaga at vera ílætin. Mannfólkini vóru tó ikki í kappum.

Kapparnir settu enn meira lív í framførsluna hjá lívligu normonnunum, og tá kóri› ímóti endanum gjørdist í rættiliga gó›um lag, var ta› sum um at allir sangarnarnir hingu saman í einari myrkabláari aldu, i› leika›i uppi á pallinum í Nor›urlandahúsinum.

Ikki kirkjugongd

Tónleikurin var gospel hóskvøldi›, men konsertsalurin í Nor›urlandahúsinum var› ikki gjørdur um til eina kirkju ella samkomuhús av teirri orsøk.

Stanvanger Gospel Choir tyktist vera tilvita› um at tey sungu á einum fjøltátta›um tónleikafestivali har áhoyrararnir eru ymiskir.

Eingin bønarløta kom upp ímillum tónleikin, og sum so heldur eingin bo›skaparbo›an.

Tó so, ein av kórlimunum spældi ein lítlan leik á pallinum, har áhoyrararnir fingu eitt or› ella tvey vi› um, hvussu tey best kunnu koma nær Gu›i, men ta› var ein stuttur og nokkso náturligur partur av konsertini, so tey, i› einans vóru komin fyri at hoyra sjálvan tónleikin, fingu ta›, tey komu eftir uttan uttanumtos.

Á dett swing

Eingi mørk vóru fyri hvat sangarin Martin kundi gera vi› rødd síni

Ta› svinga›i sum sjáldan, tá danski bólkurin Swinging Link var á palli á Jazzfestivalinum hóskvøldi› og stjól bæ›i palltí› og innara penduli› í áhoyrarunum

RÚNAR REISTRUP

Eitt trummusett, ljómbor›, ein kontrabassur, ein gittari, ein percussionistur, ein munnharmonika, ein saxofon og tríggir messingblásarar. Ta› var ta›, i› Swinging Link hev›i at bjó›a fram.

Ája, og so eisini ein sangara.

Og ta› var ikki bara ein og hvør. Lítli klæni ungi ma›urin vi› mikrofonini tók øll og alt á bóli vi› eini rødd, sum næstan fekk Stevie Wonder til eitt blikna.

Ta› tyktist næstan, sum var einki mark fyri hvat hesin lítli ma›urin kundi syngja og annars fáa í mikrofonina av ymiskum ljó›um.

Men aftur til bólkin, sum stavar úr Hjørring.

Oddama›urin, Jens Nørholm, sat vi› ljómbor›ini og st‡rdi sínum troppum. Rútmusektiónin helt til høgrumegin áhoyrararnar. Teir f‡ra blásararnir og munnharmonikuleikarin stó›u hinumegin.

Bólkurin kann setast í bás sum ein swing- og jazzbólkur og klassifiserast sum ein av teimum gó›u.

Tónleikararnir eru ikki hvørjir sum helst – teir hoyra til betru deildina í Danmark, og so væl samanspældir vóru teir, at ta› rætta swingi› var stabilt ongantí› svingandi.

Mere sving i

Hetta var tó ikki júst tann tankin, i› rann í hug, tá Swinging Link spældi fyrsta lagi›. Eitt fri›arligt lag uttan ta› stóra hóvastáki› og uttan nakran sangara.

Blásararnir spældu bara nøkur stutt innsløg inn ímillum róligu rútmuna. Ta› sá snøgt sagt út til at gerast eitt sindur ke›iligt.

– Nu går vi over til noget med lidt mere sving i, seg›i Jens Nørholm vi› ljómbor›i› og nú byrja›i bassurin at ganga.

Blásararnir spældu sínar fyrstu soloir, og gittaristurin vísti sítt vir›i.

Áhoyrararnir fingu eisini eina av nógvum inniligum munnharmonikusoloum frá stóra svianum, i› oddama›urin í bólkinum kalla›i Carlson.

Enn var percussionisturin tó einasti ma›ur, i› rættiligt lív var í.

Men so broyttist.

– Må jeg have lov til at præsentere vores sanger, Martin, rópti ma›urin vi› ljómbor›i›, og ein sera sprelskur f‡rur leyp upp á pallin og svinga›i í øllum kroppinum.

Erna›ust

Áhoyrararnir mistu máli› eina løtu, tá sangarin fór at brúka sítt, men lív kom harafturímóti beinanvegin í menninar á pallinum.

Improvisatiónirnar blivu fleiri í tali, og tónleikararnir løgdu meira og meira í tær, sum konsertin lei› út.

Fólkini á áhoyraraplássunum komu vi› og klappa›u óført eftir hvørt solospæl.

Hetta var ta› slagi› av tónleiki, sum øll dámdu. Nokkso traditionelt bigband swing vi› sangara, i› leiddi tankarnar aftur á Sinatra, men vi› einum serligum groove og einari pallframførslu, sum effektivt for›a›i fyri at nakar slapp at ke›a seg.

Springfjø›urin á pallinum var sangarin, sum eftir øllum at døma ikki klára›i at standa í fri›. Hóast ta› ofta gekk long tí› millum at hann hev›i nakra uppgávu á pallinum, so var hann allatí›ina vi›, og tá hann ikki fann sær naka› betur at gera, sang hann saman vi› tónunum hjá blásarunum.

Blásararnir blivu vekk

Blásararnir vóru væl upplagdir og ímóti endanum av konsertini góvu teir alt teir høvdu í solounum.

Tíverri hoyrdust teir ikki nóg væl.

Vanligt er, at tá blásararnir taka hornini fyri munnin, brestur ta› út ígjøgnum hátalararnar og hjartarútman fer eitt kvink uppeftir. Men blásararnir í Swinging Link vóru skrúva›ir ni›ur so teir oftast ljó›a›u sum bakgrundstrompetir, eisini tá ætlanin var at teir skuldu blása rútmusektiónina av pallinum.

Ta› var nokkso synd, men sum konsertin lei›, mátti oyra› venjast vi› at kompensera fyri væntandi ljó›styrkina hjá blásarunum. Hinir tónleikararnir á pallinum royndu eisini at dempa seg, tá ta› gjørdist teimum greitt, at teknikkararnir ikki høvdu ætlanir um at lata blásararnar koma longur fram í ljó›myndina.

Konsertin hjá Swinging Link fór ein gó›an hálvan tíma útyvir ásettu tí›ina, og hóast hon solei›is gjørdist nokkso lang, so fóru áhoyrararnir ongan veg, og øll vóru dúgliga vi›, tá bólkurin skuldi klappast upp á pallin aftur.

Politistur

Eitt arbeiði við avbjóðingum

Politiið er eitt av stóru arbeiðsplássunum í Føroyum. Her hevur tú møguleikan í fullan mun at brúka tínar fakligu royndir og tínar persónligu eginleikar í einum sjálvstøðugum arbeiði við nógvum avbjóðingum og møguleikum at mennast.

Høvuðsuppgávan hjá politinum er:

- At vera sjónligt og skapa trygd fyri borgaran og samfelagið
- At fyribyrgja, at ósemjur, ófriður og kriminalitetur íkemur
- At fara eftir, kanna og uppklára framdan kriminalitet
- At tryggja, at galdandi reglur vera hildnar og fyribyrgja, at vanlukkur henda

Politiið hevur til dømis ein høvuðsleiklut í arbeiðinum at fyribyrgja kriminalitet – ikki minst millum børn og ung.

Grundarlagið fyri politiarbeiðinum er virðingin fyri rættartrygdini hjá borgaranum.

Eitt arbeiði allar sólarringin

Arbeiðið hjá politinum verður gjørt í tøttum samstarvi við politistaliðnum millum einstøku politistarnar og politistøðirnar.

Her er eitt gott samanhald, og arbeiðið byggir á kunnleika til og nýtslu av førleikanum hjá einstaka politistinum fyri at røkka felags málum. Sum politistur ert tú altíð ein partur av liðnum – um tú ert til arbeiðis ella um tú hevur frí. Atlitið til borgaran og samfelagið er allatíðina í miðdeplinum, og tú veitst ongantíð frammanundan, hvat dagurin ella náttin bjóðar.

Løn og útbúgving

Longu frá fyrsta degi sum politistur í royndartíð fært tú eina kappingarføra løn. Harafturat fært tú pensión og ymisk ískoyti fyri tænastu á skiftandi tíðum. Royndartíðin er 3 ár. Aftaná tað fært tú – um tú ert egnaður til politiarbeiðið – fast starv sum politistur.

Menning og karriera

Sum politistur hevur tú góðar møguleikar fyri eini karrieru. Politiið hevur eina røð av serskeiðum – og so eru eisini leiðaraskeiðini fyri politistar, sum hava hug at arbeiða við leiðslu. Harafturat er stór trygd í starvinum og møguleikar at fáa arbeiði innan ymsar deildir ella aðrastaðni í landinum.

Ynskir tú at vera við?

Vit seta eingi formlig krøv um útbúgving ella lívsroyndir fyri at søkja starv hjá politinum. Men vit leggja dent á tínar fyritreytir at verða ein góður politistur, sum kann loysa uppgávurnar hjá politinum í samsvar við reglur og virðir í samfelagnum og við virðing fyri einstaka persóninum og rættindum hansara.

Vit vilja fegin seta fólk í starv, sum ymisliga umboða føroyingin við atliti til sosialt og mentunarligt støði – og vit ynskja eitt hóskandi býti millum kvinnur og menn.

Treytir sum skulu vera loknar, áðrenn tú søkir:

- Tú ert fyltur 21 ár
- Tú hevur føroyskan/danskan heimarætt
- Tú hevur góða heilsu, vanliga hoyrn og vanliga litsjón
- Tú hevur koyrikort til persónbil

Meiri kunning

Tey, ið ynskja meira at vita, kunnu venda sær til politistøðina á staðnum, ella politistøðina í Tórshavn, at fáa vegleiðing, spurningar svaraðar og kunningartilfar útflýggjað ella sent.

Umsóknir kunnu sendast inn alt árið, og verða upptøkuroyndir eftir tørvi. 4 politistar verða settir í 2001. Umsóknarfreistin til hesar upptøkuroyndirnar er 15. september 2000.

Føroya Landfúti
Politistøðin
Jónas Broncksgøta 17
Boks 3018
FO-110 Tórshavn
Tlf. 31 1448 · Fax 31 8266
Heimasíða: www.politi.fo